Sangleikurin Godspell:

# Framúrskarandi framførsla

**Sangleikurin Godspell hjá næmingum í Studentaskúlanum í Hoydølum hevði frumframførlsu í gjár. Leikurin var sera væl spældur og leikararnir livdu seg væl og virðiliga inn í leiklutirnar**

UMMÆLI
*Ingrid Bjarnastein*

Klokkan var trý korter til átta, og tá var longu fitt av fólki samankomið uppi í studentaskúlanum. Tjúgu minuttir seinni var nærum fullsett, og leikurin fór í gongd.

Leikurin hevði eina eksplosiva byrjan. Við teimum sterku kórrøddunum var onki at taka feil av: Hesi ungu fólk vildu vísa áskoðarunum nakað!

Godspell er ein av best umtóktu Broadway sangleikunum nakrantíð. Hann var fyrstu ferð framførdur í 70´unum í eini trý ár uttan steðg. Tó fara næmingarnir í Hoydølum ikki at spæla leikin so leingi - týsdagin verður seinasta sýningin, og hetta kann sigast ikki at verða annað enn spell.

Leikurin hevði væl tolt at verið framførdur oftari.

## Gæt og grimasse

Godspell er ein nýmótansgjørdur sangleikur av Matteusarevangeliienum. Hann er stuttligur, og tað er ferð á alla tíðina. Líggjas Olsen hevði høvuðsleiklutin sum Jesus, meðan Esben Jacobsen og Christina Elisabeth Mørkøre høvdu tveir aðrar stórar leiklutir. Líggjas var tann, sum ongantíð skifti leiklut, meðan Esben hevði nógvar ymsar leiklutir, sum til dømis Jóhannes doyparin og Judas.

16 sangir vóru í leikinum. Og ímillum hvønn sang var sjónleikur.

Sangleikurin sjálvur var ikki samanhangandi, men brot úr

Matteusarevangelienum vóru framførd uttan at hava nakað beinleiðis samband við hvørt annað.

Leikurin er heilt avgjørt øðrvísi. Hann er "peppaður" upp við nógvum stuttligum og ironiskum viðmerkingum. Tað einu ferðina brúkti Jesus "Gæt og grimasse" fyri at vísa lærusveinunum, hvat tað var hann vildi siga.

## Ósvikaligar røddir

Tær tríggjar høvuðsrøddirnar sviku ikki. Sjálvt um 14 ymsir solistar vóru við, so vóru røddirnar hjá Christinu Elisabeth, Esben og Líggjasi tær afturgangandi, og kláraðu tey hetta serstakliga væl. Christina syngur sum ein eingil, og Líggjas og Esben hava heilt avgjørt sanggávur teir kunnu koma ógvuliga langt við.

Ígjøgnum leikin ferðast áskoðarin saman við Jesusi og hansara lærusveinum ígjøgnum líðingarsøgu Jesusar. Leikurin verður ikki bert framførdur á einum palli, men tveimum, og nógv av leikinum gongur eisini fyri seg mitt á gólvinum ímillum allar áskoðararnar. Hetta ger leikin intiman og meira persónligan. Leikararnir venda sær við jøvnum millumbilum eisini til áskoðararnar, soleiðis, at bæði leikarar og áskoðarar á ein ella annan hátt skapa eina heild.

## Vælnøgd

Tey flestu av okkum minnast helst Skeyk, sum var framførdur í Norðurlandahúsinum fyri fimm árum síðani. Skeyk var ein risa verkætlan, sum hevði væl størri fíggjarkarmar enn Godspell. Men tað er ikki ov nógv sagt, at Godspell, hóast trongu fíggjarkarmarnar, livdi væl og virðiliga upp til Skeyk. Andin á leikarunum var tann rætti, og eisini hjá teimum dugnaligu tónleikarunum, ið myndaðu orkestrið riggaði alt, sum tað skuldi. Cellospæl til ein av sangunum frá Høgna Reistrup, og violinspæl frá Guðný Brynhild Næs settu bara prikkin yvir i´ið.

Framleiðslustjórin, Hans Olivur Højgaard Joensen, var eftir frumframførsluna, av góðum grundum, væl nøgdur.

- Eg eri ógvuliga væl nøgdur, segði Hans Olivur Højgaard Joensen. - Tað gekk ógvuliga væl at framføra í kvøld, betri enn til aðalroyndina. Eg kann ikki siga annað enn, at eg eri glaður.

Leikararnir vóru allir ógvuliga glaðir. Eftir framførsluna gingu teir runt á skúlanum við stórum smílum um alt andlitið.

- Eg eri sera væl nøgdur, sigur Líggjas Olsen, Jesus, við einum stórum smíli. - Hetta hevur verið ógvuliga spennandi, stuttligt og lærurríkt at vera við í. Og eg eri ógvuliga væl nøgdur við okkara fyrstu framførslu.

Líggjas sigur eisini, at hann valdi at siga ja til henda leiklutin, tí tað er ein avbjóðing at skula syngja slíkan tónleik. Hann helt, tað virkaði kul og stuttligt, men tað er eisini farið við nógvari tíð. Í seinastuni hevur verið vant ógvuliga hart til frumframførsluna.

Men summa summarum: Ein livandi, intens, stuttlig og gleðispreiðandi framførsla, sum avgjørt er eina vitjan verd. Tit verða ikki skuffað! Men tað er at skunda sær. Leikurin verður bert framførdur til og við týsdagin 12. mars. Eftir tað pakka Godspell leikararnir saman.


*Líggjas Olsen í høvuðsleiklutinum sum Jesus, var sera væl nøgdur við framførsluna í gjár*


*Næmingarnir á Studentaskúlanum hava heilt avgjørt rós uppiborið fyri eina framúrskarandi framførslu*


**Fótbóltur 2002**

**- serútgáva í litum frá Sosialinum**

Aftur í ár gera vit eitt fótbóltsblað, har vit royna at leiða lesaran eitt sindur meira afturum leiktjøldini enn vanligt. Tosað verður við leikarar, venjarar og leiðarar, sum hvør í sínum lagi hava givið til kennar sínar hugsanir og ynski.

Fyritøkur og onnur, ið ynskja at lýsa í hesari serútgávu, eru vælkomin at venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

Deadline fyri at fáa lýsingar inn er 20. mars.

Ringið til Sosialin 311820, og tosið við:
Anju Weihe
Marknaðardeildin
anja@sosialurin.fo




# Sigri Gaini við í Polle-filminum

**Føroyska Sigri Mitra Gaini hevur ein stóran leiklut í skemtifilminum Polle-fiction, sum verður frumsýndur í kvøld. Filmurin kostaði 13,3 milliónir at framleiða, og hann dregur nógv fólk í biograf**

FILMUR
*Stefan í Skorini*


*Karsten Kørelærer er áhugaður í Shawarma, sum verður spæld av føroysku Sigri Mitra Gaini*

Sigri Mitra Gaini, ið er best kend úr filminum Bye Bye Bluebird, sum Katrin Ottarsdóttir leikstjórnaði, hevur leiklutin sum muslimska gentan Sulaima ella Shawarma, ið arbeiðir á eini grillbarrini í býnum.

Polle Fiction filmurin er sprottin úr reklamufilmunum hjá telefonfelagnum Sonofon, sum fólk kenna úr donskum sjónvarpsrásum.

Filmurin fylgir fynbúgvanum Polle við tí kiksaða hárinum og tí reyða Puch-Maxi prutlinum.

Høvuðspersónurin Polle fra Snave gerst skotin í Shawarmu, men hann hevur kapping frá øðrum. Hetta spælir bara væl av. Polle hevur eisini verið forlovaður við eini aðrari, ið sigur, at hon er við barn.

## Filmsgongdin

Filmurin er um Polle fra Snave, ið er ein lítil býur á Fyn. Polle er 30 ára gamal og býr heima. Í filminum kemur Polle út fyri einum arbeiðsóhappi, tá hann við arbeiðsfeløgum sínum tømir septiktangar.

Útlit eru tí fyri, at Polle fær endurgjald. Hetta vekir beinanvegin áhugan hjá Lillian, ið fegin vil hava ein part av peninginum. Polle fær tó frænir av, at hon er úti eftir peninginum og avlýsir brúdleypið.

Hann verður tó skotin í tí vøkru muslimsku gentuni Sulaima ella Shawarma. Karsten Koyrilærari er tó eisini áhugaður, og hetta førir til stríð teirra millum.

Reklaman hevur verið ógvuliga væl umtókt, og tí verður filmurin væntandi væl vitjaður í donskum biografum.

Tórbjørn spyr um OL-viðurkenning:

# Vil hava stuðul frá Fogh

**Tórbjørn Jacobsen, limur í Norðuratlantiska bólkinum í Fólkatinginum, vil vita, um forsætisráðharrin hevur í hyggju at viðmæla Føroyar sum sjálvstøðugan lim í altjóða olympisku nevndini**

FYRISPURNINGUR
*Stefan í Skorini*

»Vil statsministeren støtte de færøske bestræbelser på at opnå olympisk anerkendelse?«

Soleiðis ljóðar stutti og greiði spurningurin hjá Tórbirni Jacobsen til Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra. Fyrispurningurin varð settur í danska Fólkatinginum mikudagin 6. mars.

Løgmaður Anfinn Kallsberg, sum er verji hjá ítróttinum í Føroyum, hevur sent Anders Fogh Rasmussen eitt bræv, har hann biðjur forsætisráðharran um eitt viðmæli til Føroyar.

Fogh ivast eftir øllum at døma, um hann skal geva Føroyum sítt viðmæli vegna tjóðskaparligu støðu Føroya. Gitingar eru um, at løgfrøðiligar forðingar eru orsøkin til, at Fogh enn ikki hevur svarað brævi løgmans.

Tórbjørn sigur í viðmerkingunum til spurningin, at hóast flestu limirnir í IOC umboða sjálvstøðug lond, er møguleiki hjá einum heimastýri ella sjálvstýrandi øki at fáa viðurkenning og gerast limur.

Tilsamans trettan viðurkendar olympiskar nevndir eru frá londum, ið ikki hava greitt sjálvstýri, men sum eru í einum hvørjum felagsskapi við størri land.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at tá hesi trettan londini hava fingið viðurkenning, kann Føroyar tað sama fáa sína viðurkenning í olympiskum sambandi.

Hann skundar tí undir Anders Fogh Rasmussen og vil hava hann at geva Føroyum sítt viðmæli, hóast tey nógvu løgfrøðiligu stríðsmálini um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Hann vísir á, at ríkisumboðsmaðurin gav Føroyum sítt viðmæli í 1993, og at Ísland fekk olympiska viðurkenning, áðrenn landið tók sjálvstýri. Harumframt hevur danska ítróttarsambandið givið Føroyum sín fulla stuðul saman við teimum norðulendsku sambondunum.

– Fyri føroyskan ítrótt hevur viðurkenningin stóran týdning, ikki minst fyri tað dagliga altjóða samstarvið. Tað hevði tí verið ein vøkur gerð, um danski forsætisráðharrin – hóast tey stríðsmál, sum eru millum politikarar – hevði verið virkin í at stuðla føroyskan ítrótt, sigur Tórbjørn at enda í fyrispurninginum.

## ÍSF arbeiðir fyri viðurkenning

ÍSF hevur aftur nú sett sær fyri at fáa viðurkenning og limaskap í altjóða olympisku nevndini, IOC. Í hesum sambandi heitti ÍSF á løgmann um at taka málið upp við forsætisráðharran, tá hann var her á vitjan fyrr í ár.

Heðin Mortensen, forseti í ÍSF, sigur, at tey ikki kunnu bíða leingi enn eftir svari frá Fogh, og um hann ikki vil geva ÍSF sítt viðmæli, so mugu tey bara arbeiða miðvíst víðari.


*Til allar okkara kæru mammur, konur, døtur, vermøður, ommur, langommur, gentur, unnustur, vinkonur, sweethearts, svigarinnur, systrar, fastrar, mostrar...vit heilsa tykkum øllum á Kvinnudegnum 8. mars.*



*RESTORFFS hevur eitt gávukort til allar kvinnur, sum hava føðingardag í dag. Setið tykkum í samband við okkum.*

Restorffs
**Tlf. 31 47 28**
**Fólksins Bryggjarí síðani 1849**